# Skotar taka Havnina

**Hesa vikuna verða skotskir dagar í høvuðsstaðnum, og tiltøk verða ymsataðni. Millum annað ber til at smakka skotskan mat í SMS**

SKOTLAND
*Eyðun Klakstein*

Í dag verður sett hol á skotskar dagar, sum verða í Havn komandi dagarnar. Tað eru fólk úr Aberdeen, sum eru komin til Føroya við ymsum tiltøkum.

Fyri 10 árum síðani tók Havnar kommuna fyrsta stigið til at fáa tættari samband við Aberdeen. Tá í tíðini sigldi Smyril millum Føroyar og Aberdeen, og nógv samband var Havnina og skotska oljubýin.

Fyri trimum árum síðani samdust býirnir um eina samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at stuðla vinnulívi, handli, mentan ítrótti og útbúgvingarøkinum til størri samstarv.

Eitt ítøkiligt úrslit av hesum samstarvi er grunnurin Aberdeen-Tórshavn, sum báðir býirnir hava sett pengar í at stuðla samstarvinum.

Nú verður so skotska vika í Havn, og eini hálvthundrað fólk eru komin úr Aberdeen til Føroya. Umboð eru fyri alskyns øki.

## Dagarnir settir í SMS

Á middegi í dag verða dagarnir settir í SMS. Skotskir sekkjapípuspælarar fara at spæla við inngongdina til SMS, og inni í keypsskálanum fara Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, og John Reynolds, Lord Provst, borgarstjóri í Aberdeen at halda røður.

Aftaná hetta fer kokkurin Ian Simpson at bjóða smakkiroyndir av skotskum mati á Torginum í SMS, og umboð fyri ferðavinnuna og Robert Gordon lærustovnin fara at kunna um teirra virksemi.



*John Reynolds, Lord Provst, borgarstjóri í Aberdeen er á odda fyri stóra ferðalagnum úr Aberdeen*

Mikudagin verða aftur tiltøk í SMS frá middegi og út á seinnapartin. Skotskar smakkiroyndir eru aftur á skránni, og framsýning er av skotskum vørum og tænastum á Torginum.

## Nógv tiltøk

Tiltøk verða eisini aðrastaðni. Eitt nú fer Aberdeen Maritime Museum at hava eina framsýning í Müllers Pakkhúsi. Frásøgufólk fara at vitja nakrar skúlar í Havn, pensiónistar úr Aberdeen verða gestir í Tilhaldinum í Tórsgøtu, á Platform verðu tónleikur og dansur, og bæði í Norðurlandahúsinum og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði vera tónleikatiltøk við millum annað næmingum av Aberdeen City Music School.

Dagarnir verða kallaðir »A taste of Scotland«, og teir verða at síggja aftur í høvuðsstaðnum komandi dagarnar.

# Keyp ferðaseðilin á atlantic.fo

TÍÐINDASKRIV

Atlantic Airways hevur fingið netsølu a heimasíðuni. Á atlantic.fo fært tú nú bílagt, keypt og goldið fyri ferðaseðilin. Tú velur nær, hvaðan og hvagar, tú ætlar tær at fara, og so fært tú beinanvegin at vita, um pláss er í flogfarinum. Tú ið tú bíleggur, fært tú at vita, hvussu nógv ferðaseðilin kostar, og tískil kanst tú rinda við gjaldkorti beinanvegin.

Á netsøluni kanst tú eisini biðja um at sleppa at sita á ávísum plássi. Hevur tú skrásett teg á netsøluni, kanst tú harumframt halda skil á øllum ferðum, tú hevur verið. Ert tú í EuroBonus-skipanini, verða tíni stig skrásett beinanvegin. Eins og vanligt geva ferðaseðlar, ið eru keyptir á netsøluni, tær eisini rætt til súlur. Tú velur, um tú vilt hava ferðaseðilin sendandi við postinum ella um tú heintar hann í floghavini í Vágum.

Nú ið netsølan hjá Atlantic Airways er komin, ert tú leysur av tíð og telefon. Netsølan er altíð opin, og nú er tað tú, ið er títt egna avgreiðslufólk.








# Dáin samlar fyri buss

**Leygardagin skipaðu tey á umlættingarheiminum, Dáanum í Klaksvík, fyri tombola til frama fyri buss til heimið**

TOMBOLA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin klokkan 10 var tombola á umlættingarheiminum, Dáanum í Klaksvík.

Á heiminum siga tey, at tey treingja til nýggjan buss, og tí hava nøkur av starvsfólkunum tikið stig at savna pening til endamálið.

Fyri nøkrum árum síðani, tá Dáin hevði 10 ár á baki, fekk stovnurin ein buss frá býráðnum. Hann var givin stovninum í føðingardagsgávu, tá kommunan fekk nýggjan buss til serflutningstænastuna.

Bussurin kom serstakliga væl við tá. Men nú er hann gamal og slitin, og kostar í umvælingum.

Hetta var triðja tombola, ið skipað var fyri til frama fyri bussin til Dáan. Tað komu 11.000 krónur inn leygardagin, men enn er langt eftir á mál, siga tær, ið skipa fyri innsavningini.



*Nógv fólk vóru á tombola í Dánum leygardagin. Tey flestu vildu helst stuðla tiltakinum - men onkur var heppin og fór heimaftur við einum køkubita*
*Mynd: Bárður Lydersen*

# Savna inn til børn í Nepal



*John Reid Ziska Jacobsen, skótaleiðari, stóð fyri útitiltakinum, sum skipað varð fyri í Klaksvík leygardagin*
*(Mynd: Bárður Lydersen)*



**Í Klaksvík skipaðu KFUM og K skótar fyri útitiltaki fyri børn leygardagin. Tiltakið var í samband við árligu skótahjálpina, sum í ár er til frama fyri børn og ung í Nepal**

SKÓTAHJÁLPIN
*Rúna Sivertsen*

Veðrið var av tí besta leygardagin, og børnini hugnaðu sær óført á plássinum við telefonstøðina í Klaksvík, har skótarnir m.a. høvdu sett hoppiborg upp til børnini at stuttleika sær í. Eisini vóru kaffi og vaflur at fáa til keyps.

Peningurin, sum skótarnir fáa inn við árligu innsavningini, fer í ár til skótamiðdepul í Nepal.

Í ár er ár teirra brekaðu, og fer ein partur av innkomna peninginum til Meginfelag Teirra Brekaðu.

Skótarnir í Klaksvík hava við skótahjálpini og øðrum tiltøkum fingið um 12.000 krónur inn í ár.